FISKIVINNUTÍÐINDI

# Sjúrðaberg í Bay Roberts

Í gjár fóru rækjutrolarin hjá Kjølbro, Sjúrðarberg, út aftur á nýggjan túr eftir at hava verið inni í Bay Roberts í New Foundlandi og landa 350 tons av rækjum. Teir fóru inn seinasta leygardag og hava eisini skift manning og tikið proviant og aðra útgerð.

Sjúrðarberg hevur ikki verið heima síðan á jólum og seinasta túrin byrjaðu teir 26 februar, so fiskiskapurin hevur verið brúkiligur.

Tað eru brøðurnir Eyðstein og Óli Sørensen av Viðareiði sum skiftast um at føra Sjúrðaberg. Eyðstein er skipari, nú teir eru farnir út aftur.

*je*



# Fiskaði fýra ferðir kvotuna

Eitt orðatak sigur , at fáur lýgur meira enn helvtina, men hetta kann ein ikki siga um eigararnar á fiskibátinum "Else Karine" úr Haugesund. eigararnir eru ákærdir fyri at hava veitt fýra ferðir so nógv sum teir hava loyvi til. Teir kunnu nú rokna við einum endurgjaldskravi av heilt søguligari støðd, einar 5,7 milliónir norskar krónur. Og tað er nógvur peningur, tí "Else Karine" er ikki nakað stórt skip, skrivar norska vevsíðan Intrafish.

Síðan 1998 hevur "Elsa Karina" veitt av eini kvotu, sum krevur, at skipið er 29 metur langt. Skipið er so langt, men eigararnir hava ongantíð fingið loyvi at veiða við einum so stórum skipi. Teir hava bert havt kvotu til einn 15 metur langt skip, og tað gevur munandi minni kvotu. Málið endar helst í rættinum.

*je*

# Fuglberg í Eysturgrønlandi

Rækjutrolarin Fuglberg roynir í løtuni í Eysturgrønlandi. Reiðaríið frætti frá teimum í gjár, men tá var ongin fiskiskapur. Annars hevur verið brúkiligt fiskarí hendan túrin. Teir hava 61 tons inni af góðum rækjum, av japanrækjum og kókaðum rækjum.

*je*



# Næraberg út í gjár

Næraberg hevur seinastu dagarnar ligið og landað á Klaksvík. Hann hevði fulla last hendan túrin, eini 1050 tons. Harav vóru 750 tons surimi og restin var mjøl. Næraberg var so óheppin tá teir komu inn, at hann botnaði. men tað gekkst væl at fáa skipið leyst aftur.

Næraberg fer nýggjan túr í dag. Teir royna saman við hinum svartkjaftatrolarunum í føroyskum sjóøki í løtuni. Svartkjaftabátarnir hava fingið væl seinastu tíðina, men minni var at fáa mánadagin og týsdagin.

*je*



Variant - Vøggan og Inntech

Nú er nógv nýggj vøra heimkomin

Vøggan hevur hópin av nýggjum barnavognum og barnastólum á goymslu

Sjálvandi hevur Inntech VVS nógv gott til varman og ventilatiónina.





Teir væl umtóktu vognarnir TRILLE og ROXAN og CONDOR



INNTECH 3 í einum á ovaru hæddini á FK í Saltangará.
Kom inn á ovaru hæddina á FK og síggj okkara úrvæl.



Variant hevur fingið nógvar nýggjar og lekrar gávulutir til tey yngru

Eisini hava vit fingið barnaklæðir av merkinum CLAIR og CHICCO

Variant • Vøggan• Inntech
Tlf. 449 588 · Fax 449 499



Bilar

Nr. 84 • hósdagur • 3. mai 2001 • 75. árgangur

# Citroën Evasion HDi – stórur og rúmligur MPV

**Citroën Evasion verður gjørdur í Frankaríki, á somu verksmiðju sum Fiat Ulysse, Peugeot 806 og Lancia Zeta. Hesir fýra MPV bilarnir eru næstan eins, men smávegis munur á designinum, gevur teimum hvør sín identitet**



*Citroën Evasion verður gjørdur í Frankaríki, á somu verksmiðju sum Fiat Ulysse, Peugeot 806 og Lancia Zeta*
*Mynd: Jens K. Vang*

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Navnið Evasion er franskt og merkir nakað við frí-løtuarbeiði ella ítriv. Tað kann av sonnum sigast um hendan bilin, sum man næstan kann brúkast til hvat sum helst. Til ber at hava frá einum setri, og heilt upp í átta sitipláss, um man hevur brúk fyri tí. Eisini kunnu framsetrini snarast 180 stig. Tað at dúrkið er heilt slætt yvir allan bilin, ger at tað er sera lætt at koma runt í bilinum, onki við at smekka beinini í hondbremsuna ella gearstongina.



*Citroën Evasion hevur fleiri møguleikar við at flyta setrini ella taka tey úr*

### Gott útsýni

Sum á flestu MPV bilum, er hesin lættur at koma inn og úr, man situr høgt og útsýnið er gott allan vegin runt, og fáir blindvinklar. Setrini eru stútt, samstundis sum tey eru góð at sita í. Hóast Evasion ikki hevur hydrauliska fjaðraskipan, sum teir størru Citroën bilarnir eru kendir fyri, er hann sum ein eyðkendur franskur bilur at koyra. Koyrieginleikarnir eru heilt í topp, og hann er óvanliga lættur at koyra við í býnum, eins og á longri túrum millum bygdir.

### Orkusparandi og ljóðleysur

Fyrr var ein dieselmotorur samsvarandi við nógvan larm, svartan royk og lítið og onki upptrekk. Men nú er vent í holuni hesum viðvíkjandi. Hesir nýggju HDI motorarnir seta heilt nýggjan standard fyri at vera orkusparandi, kvikir og ljóðleysir. Satt at siga, merkist tað næstan ikki at bilurin er diesel. Bilurin vit hava fyri okkum her, er ein 2.0 HDI við 110 hk við common rail innspræning. Tað at dysurnar við brennievninum verða stýrdar elektrohydrauliskt, og eru teldustýrdar, ger at blandingin av luft og brennievni altíð er optimal, og luftdálkingin verður so lítil sum til ber.

### Standardútgerð

Av standardútgerð kann til dømis nevnast servostýring, ABS-bremsur, dupultar airbag, trygdarkabina, barnatryggar dragihurðar á síðunum, nakkastúttur á øllum setrunum, el-hita í framsetrunum, fjarstýrt sentrallás, heilautomatiskt klimaanlegg og flúgvaraborð á stólarygginum á framsetrunum.

## Citroën Evasion 2.0 HDi

| | |
|---|---|
| Motorurin | 2.0 litur 4 syl. diesel 110 hk |
| 0-100 km/t | 14,8 sek |
| Oljunýtsla | 14,9 km/l |
| Dekkstødd | 205/65-15 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 445,4 cm |
| Breidd | 181,8 cm |
| Hædd | 171,4 cm |
| Eginvekt | 1625 kg |
| Totalvekt | 2400 kg |
| Viðførisrúm | 340 / 2100 litrar |
| Prísur | kr. 330.000,- |
| Søluumboð: | Ivan Johansen Bilar<br>Hoyvíksvegur 63<br>FO-110 Tórshavn<br>Tlf. 313666 |

Síggj Europa við Atlantic Airways!


Berlin
Prísir úr 3.796,-


Bruxelles
Prísir úr 3.440,-


Amsterdam
Prísir úr 3.315,-

*Sí annars øll okkara góðu tilboð í blaðnum "Út í heim"*

*Ferðirnar kunnu bíleggjast á øllum ferðaskrivstovum kring landið.*

*Íroknað prísin er flogferð fram/aftur Føroyar - Keypmannahavn við Atlantic Airways og víðari við SAS. Møgulig gising í samband við ferðina og ferðaavgjøld eru ikki íroknað. APEX treytir eru galdandi og møguleiki er fyri at steðga í Keypmannahavn í mesta lagi 2 dagar.*

ATLANTIC AIRWAYS
Tel. 34 10 10 · Fax 34 10 01
www.atlantic.fo